


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Hanna heldur

Val



HANNA JENSEN
Fólkaflokkurin

**At tjóðarrættindi okkara skulu staðfestast**
Tjóðarrættindi okkara eru partur av okkara dýrasta tilfeingi. Tí er alneyðugt, at vit sum tjóð taka fult ræði í okkara landi, at vit fáa føroyskt fullveldi seinast í 2015 – men helst í komandi valskeiði. Tað, sum vit ætla, tað mugu vit gera í okkara tíð og ikki vænta, at komandi ættarlið skulu føra ætlanir okkara út í lívið. Ov nógv ættarlið eru farin undir mold, uttan at frælsisvónin varð til veruleika. Vit mugu loysa hetta mál Føroyum og føroyingum at frama.

**At búskapur okkara skal stimbrast**
Vit mugu arbeiða fyri einum sjálvberandi búskapi, samstundis sum vit greiða støðuna viðvíkjandi okkara tjóðarrættindum. Vit mugu minka blokkstuðulin (ríkisveitingina) sum skjótast og harvið gera okkum búskaparliga leys av øðrum. Búskaparpolitikkur okkara má vera ábyrgdarfullur og framfýsin, soleiðis at vit kunnu fáa meiri burtutúr og vinna meiri pening til landshúsarhaldið.

**At tey veikastu í samfelagnum skulu styrkjast**
Eingin keta er sterkari enn veikasta liðið. Vit fara at eydnast sum samfelag í mun til, hvussu vit fara við okkara veikastu. Tey einsamøllu, tey sálarsjuku, tey, sum eru bundin at rúsevnum, tey misnýttu, teir støku uppihaldararnir, einkjurnar og einkjumenninir, tey foreldraleysu, tey ið bera brek, tey fátøku...Hesi skulu tryggjast hjálp og somu rættindi, sum onnur til samfelagstilboð og eina virðiliga og góða tilveru.

**At frælsi hins einstaka skal eykast**
Einstakligafrælsi er ein partur av liberalu hugsjónini, sum er eins týdningarmikil og tjóðarfrælsi og síða av somu søk. Frælsi hins einstaka til at velja, hvussu hann vil skipa sítt lív, skal vaksa, frælsi til at velja hvørjum samfelagstilboði, hann ynskir at taka av t.d. innan skúla og barnaansing. Peningaligt frælsi við m.a. lægri skatti er eisini partur av hesum.

**At útbúgving skal raðfestast**
Ásannandi at hugans tilfeingi er eitt hitt fremsta tilfeingi, mugu vit støðugt raðfesta útbúgving, vitan og servitan høgt. Her er peningur at vinna, tí vitanartungar vinnur eru tær, sum geva inntøkur í dag. Um vit ynskja at vera áhugaverd og ynskja at gera okkum galdandi í atjóða høpi, so mugu koma við servitan, sum vit arbeiða og granska okkum fram til her í Føroyum við øllum tí tilfeingi, sum Føroyar og føroyska fólkið hevur at bjóða. Og tað er ikki so lítið. Spurningurin er bert, um vit ætla okkum í gongd ella ikki. Skúlaverkið má setast høgt heilt frá fyrsta stigi og uppeftir, so at vit fáa teoretiskt dugnaligt fólk, sum eisini samstundis lærir at umseta teori til veruleika.

**At mál okkara skal kjølfestast**
Føroyska málið er fremsta eyðkenni okkara sum tjóð, og er týdningarmikil partur av okkara samleika. Í alheimsgerðini eru smá mál undir stórum trýsti. Føroyska málið hevur - hóast stríð - gjørt stór framstig, síðani føroyingar í semju valdu at arbeiða málinum at frama fyri meiri enn hundrað árum síðani. Nú er ein onnur tíð, har vit mugu finna saman aftur og seta okkum nýggj mál okkara tjóðarmáli at frama. Fjálgast skal eisini um føroyskar bókmentir, og somuleiðis mugu nýggj mál eisini setast teimum viðvíkjandi.

**At nýhugsan innan vinnulívið skal fjálgast**
Vit hava eina stóra høvuðsvinnu í fiskivinnuni. Okkum tørvar at byggja upp aðrar vinnur afturat henni, samstundis sum at vit nútímansgera og effektivisisera fiskivinnuna. Ferðavinnan er ein vinna undir uppbygging, men føroyingar eru skapandi fólkaslag, og teir røttu karmarnir, tann rætti stuðulin og tær røttu visiónirnar høvdu skjótt sett ferð á onnur nýggj frambrot eisini. Tað er alneyðugt, fyri at vit kunnu fáa størri inntøkur til landið og fyri at fáa størri javnvág í okkara vinnulív og framhaldandi fáa okkara fólk at trívast í landinum.

**At umhvørvið skal virðast**
Føroyar eru fiskivinnutjóð, og tí er neyðugt áhaldandi at upphugsa nýggjar og framskygdar loysnir fyri umhvørvi okkara innan fiskivinnu, hjávinnur og alt tað virksemi, vit fáast við. Orkusparandi tól, alternativar orkukeldur og broytt-ur hugburður skal til. Skal ferðavinnan mennast, má umhvørvispolitikkur havast í huga. Men umhvørvið er eisini okkara grundleggjandi livikor, og fyri Føroyar og føroyingar, fyri heimin og heimsins fólk er hetta mál ein av okkara størstu avbjóðingum, sum altíð má havast fyri eyga.

**At heilsuverkið skal betrast**
Heilsuverkið má altíð vera so gott sum gjørligt, og vit hava skyldu til framhaldandi at gera ábøtur og skapa nýggjar loysnir fyri okkara sjúklingar. Nýggj samstørv við fleiri tænastuveitarar, ørðvísi raðfestingar, har okkara verandi sjukrahús verða gagnnýtt á skilabesta hátt, neyðugar íløgur í tól og annað, sum gera skjótan mun, eru bert nøkur av krøvunum á hesum øki. Vit skulu hava heildarætlan fyri alt heilsuøkið, so at eingin sjúklingabólkur dettur burtur ímillum. Kunnu vit ikki geva skjóta og góða viðgerð á klettunum, so mugu vit tó syrgja fyri at, hon verður veitt, har hjálpin er at fáa. Flutningur eigur ikki at vera ein forðing.

**At altjóða samstarv skal økjast**
Altjóða samstarv er avgerandi fyri okkara menning í heimshøpi. Vit mugu hava íblástur ymsa staðni frá, bæði tá tað snýr seg um vinnu, útbúgving, granskning, ítrott og mentan. Fyri at gera okkum galdandi á altjóða pallinum er neyðugt, at vit duga at fóta okkum í altjóða umhvørvi bæði málsliga, mentanarliga og innan tey serstøku økini. Vit mugu teljast millum tjóðirnar og samskifta beinleiðis við tær okkara ítrotti, mentan, vinnu og skúlaskapi at gagni. Veruligt altjóða samstarv fáa vit bert við fullveldinum. Tað eru fullveldisríkini, sum hava nógv tann besta møguleikan fyri altjóða samstarvi. Soleiðis eru treytirnar í altjóða samfelagnum. Hyggið at smáu fullveldisríkjunum í Europa - til dømis Íslandi og Luxembourg. Hesi bæði smáríkini samstarva og luttaka veruliga á altjóða pallinum í dag á øllum økjum og fáa veldugt gagn av hesum - so stórt gagn, at hesi bæði smáríkini í dag eru tey ríkastu londini í Europa. Fyri at fáa veruliget menn-andi alstjóða samstarv mugu Føroyar tí fáa veruligt fullveldi sum skjótast.

**At langtíðarætlanir á øllum økjum skulu gerast**
Alt ov ofta ber føroyskur politikkur brá av stuttskygdum loysnum, tó at nógv er tosað um Visión 2015 í seinastuni. Fyri at fáa sum mest burturúr íløgum er neyðugt, at tær verða lagdar væl til rættis, og at tær eru framskygdar og taka hædd fyri menning á t.d. tøkniliga økinum. Langtíðarætlanir við raðfestingum av ymisku landsuppávunum eru alneyðugar, so at javnvág er ímillum karmar og innihald, millum hørð og bleyt virði – so at ein áhaldandi menning og dagføring av føroyska samfelagnum í breiðari merking fer at eyðkenna Føroyar.

**Vel tí heldur Honnu**
http://hanna.folkaflokkurin.fo
www.dimma.fo/Bloggan/hanna.jensen

# Soleiðis tryggja vit dygd og góðsku á sjúkrahúsunum

Val



HANS PAULI STRØM
Landsstýrismaður,
Javnaðarflokkurin

**- Politisk ætlan um at seta tiltøk í verk at tryggja dygd og góðsku á sjúkrahúsunum. Ætlanin byggir á politiskar niðurstøður av álitinum um "Framtíðar sjúkrahúsverk", á partin um heilsuverkið í "Visjón 2015 um vælferð", og á samskifti við umboð fyri sjúklingafeløg, starvsfólk og leiðslur á sjúkrahúsunum**

Fleiri av stigunum eru ítøkilig, at fara ígongd við beinanvegin. Onnur eru meira generel og krevja drúgva fyrireiking. Øll eru partar í eini heild at fullføra í eini langtíðar menningarætlan.

**Kunning:** sjúklingarnir skulu hava nøktandi munnliga og skrivliga kunning, bæði við innlegging, undir viðgerðargongdini og við útskriving. Lurtast skal í størri mun eftir sjúklingunum.

**Kontaktpersónsskipan** skal setast í verk, so at einstaki sjúklingurin hevur ein ella í mesta lagi tveir ávísar sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava høvuðsábyrgdina av samskiftinum.

**Sjúklingavegleiðari:** sjúklingavegleiðari og møguliga eisini ein heilsusálarfrøðingur skal setast við sjúkrahúsini.

**Rapporteringsskipan** har heilsustarvsfólk hava møguleika anonymt til at fráboða feilir og óætlaðar hendingar í sambandi við viðgerð av sjúklingum.

**Útskrivingarsamrøða** við lækna skal skipast tá ið sjúklingar verða útskrivaðir.

**Samskipan við Nærverk og kommunulækna:** føst mannagongd skal skipast um samskifti og samstarv um einstaka sjúklingin, millum sjúkrahúsini, kommunulæknar og Nærverkið (heimarøktina, trivnaðartænastuna og barnatænastuna)

**Viðgerðarætlanir:** innan øll tey størru viðgerðarøkini skulu gerast yvirskipaðar virkisætlanir, so sum krabbameinsætlan, apopleksiætlan og hjartaætlan.

**Góðskustýringsskipan:** føroyska sjúkrahúsverkið skal knýtast at viðurkendari "akkrediteringsskipan" sum t.d. Den danske kvalitetsmodel. Slík skipan kann tryggja, at málini og kósin fyri størri dygd og góðsku støðugt verða eftirmett.

**Starvsfólkamenning:** strategisk menningarætlan skal gerast fyri heilsustarvsfólk, har samstarvsavtalur við sjúkrahús uttanlands verða partur av ætlanunum. Endamálið skal verða at varðveita og viðlíkahalda servitanina í føroyska sjúkrahúsverkinum. Samstarvið skal fevna um eftirútbúgving, útveksling av starvsfólkum og gransking.

**Raðfestingarætlan fyri lækna- og røktarøkið:** føroyska sjúkrahúsverkið skal uppraðfestast við serlæknum á øllum teim økjum, har gjørt verður av at tað er neyðugt við læknafakligum førleika í Føroyum. Rekrutteringin av læknum skal málrættast eftir hesum. Somuleiðis skal røktarfakliga økið styrkjast, bæði við neyðugari orku og servitan.

**Fakmørkini flytast uppeftir:** bæði fyri at gagnnýta starvsfólkatilfeingið betri og fyri at skapa størri fakligan trivnað, skulu fakmørk flytast uppeftir, soleiðis at sjúkrarøktarfrøðingar yvirtaka nakrar funktiónir frá læknum og heilsurøktarar tilsvarandi nakrar frá sjúkrarøktarfrøðingum.

**Sjúklinganøgdsemiskanningar** skulu gerast afturvendandi annaðhvørt ár, so at veikleikar kunnu staðfestast og fylgt kann verða við, um tað verður rættað upp upp á ávístar veikleikar á sjúkrahúsunum.

**Viðgerðartrygd innan ásetta tíð:** tað skal ásetast við lóg, at sjúklingar skulu hava trygd fyri viðgerð innan ásetta tíð. Skilt verður millum lívshóttandi og ikki-lívshóttandi sjúkur. Vit skjóta upp at tá neyðugar fyritreytir eru fingnar til vega, skal freistin verða 4 – 8 vikur.

**Uppraðfesting í 8-ára ætlan:** ein uppraðfesting og framtíðarmenning av føroyska sjúkrahúsverkinum verður sett upp í eina 8 -ára heildarætlan. Punktini omanfyri eru partar í hesi ætlan. Tað snýr seg um lækna- og røktarfakliga økið, starvsfólkamenning, heildarviðgerðarætlanir, átøk fyri at økja um góðskuna í arbeiðs- og mannagongdum, bygnaðarlig viðurskifti um hvussu sjúkrahúsverkið skal skipast og samskipast, og síðst men ikki minst: um fíggjarligu viðurskiftini.

Framvegis eru fleiri stig í slíkari ætlan, enn tey sum eru nevnd omanfyri. Men tað verður ov drúgt at taka alt við í hesum umfari. Í øðrum grein skal eg taka tráðin uppaftur viðvíkjandi tí bygnaðarliga og tí fíggjarliga.